FÊrri arbeiðspl·ss Ì fiskivinnuni

– Vit skulu klára at endurnýggja okkum uttan almennan stuðul. Partar av fiskivinnuni klára tað sum er, men vit eru ikki komin á mál enn. Men eg havi fult álit á, at vinnan fer at koma hartil, at hon kann endurnýggja seg uttan stuðul, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður.
Mynd: Eyðun Klakstein

F¯royska fiskivinnan skal leggjast saman Ì st¯rri og fÊrri eindir. Tað fer at hava við sÊr eina meira effektiva vinnu, sum kann endurn˝ggja seg sj·lva, men tað slepst ikki undan, at tað so verða fÊrri arbeiðspl·ss Ì vinnuni Ì framtÌðini, sigur J¯rgen Niclasen, landsst˝rismaður við fiskivinnum·lum

FISKIVINNA
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Tað fer at kosta arbeiðspláss, at fiskvinnan á landi og sjógvi fer at effektivisera seg í framtíðini. Men tað er neyðugt, at vinnan leggur saman í færri og størri eindir, so hon kann endurnýggja seg sjálva.

Hetta var boðskapurin frá Jørgen Niclasen, landsstýrismanni við fiskivinnumálum, tá hann mánakvøldið greiddi norðoyingum frá framtíðar fiskivinnupolitikkinum, sum landsstýrið hevur sett út í kortið.

– Tað er ein fyrimunur fyri bæði samfelagið og vinnuna, at fiskivinnan verður effektivisera, kann vinna meira pengar og harvið kann endurnýggja seg uttan almennan stuðul, sigur Jørgen Niclasen.

– Sum støðan er í løtuni skulu vit ikki stúra fyri, at tað verða færri arbeiðspláss í fiskivinnuni framyvir, tí tað er trupult at finna arbeiðsfólk í fleiri pørtum av vinnuni.

Taka hædd fyri miðsavnan

Landsstýrismaðurin er avgjørdur í, at myndugleikarnir skulu ikki gera av fyri vinnuna, um hon skal leggja fiskiloyvi saman ella keypa og selja virki, men karmarnir skulu verða greiðir og strangir.

– Vit skulu ikki nokta fólki at keypa ella selja skip ella virki. Tað skal eisini bera til at leggja fiskiloyvi hjá skipum saman, so vit fáa fulla nyttu burtur úr teimum skipum, sum vit skulu brúka framyvir, sigur Jørgen Niclasen.

– Hinvegin skulu vit í fiskivinnupolitikkinum taka hædd fyri spekulatión og miðsavnan av fiskiloyvum. Tað royna vit eisini at gera, tí eingin er áhugaður í, at vit fáa greivabarónar og fólk, sum spekulera í fiskivinnuni. Verður spekulatión í vinnuni, so fáa vit ikki neyðuga lønsemi í hana.

Vinnan hevur ábyrgdina

Landsstýrismaðurin leggur stóran dent á, at vinnan so vítt gjørligt sjálv skal loysa trupulleikarnir, sum eru í vinnuni.

– Tað tænir ongum endamáli, at politikarar lova, at teir skulu taka sær av øllum trupulleikum í vinnuni. Vit skulu skapa karmarnar og gera politikkin, og síðani liggur ábyrgdini hjá fiskivinnuni sjálvari at fáa tað at bera til. Soleiðis fært tú eitt sterkt og sunt vinnulív, sigur Jørgen Niclasen.

Hann óttast ikki fyri, at samanleggingar fara at kosta arbeiðspláss í ávísum økjum av landinum.

– Tað verður upp til tey, sum eiga skipini og virkini at tryggja, at tað ikki verða ávís øki, sum verða serliga rakt av samanleggingum í størri eindir. Eg dugi heldur ikki at ímynda mær, at eitt nú norðoyingar fara at selja øll skipini hjá sær. Fólkini í vinnuni mugu hava ábyrgdina av, at virksemi er í teirra øki, sigur Jørgen Niclasen.

– Landsstýrið kann ikki áleggja vinnuni, hvar skipini skulu hoyra heima og hvar virkini skulu liggja. Tað skal vinnan sjálv kunnu gera av, og eg havi eisini tað álit á henni, at hon dugir tað best sjálv.

Bert minstaløn

Seinastu árini er stuðulin til fiskivinnuna skorin niður í einki, og Jørgen Niclsen helt, at vinnan skuldi verða errin av hesum, hóast partar av vinnuni ikki vinna nóg nógvar pengar til at kunna endurnýggja seg sum er.

– Vit skulu klára at endurnýggja okkum uttan almennan stuðul. Partar av fiskivinnuni klára tað sum er, men vit eru ikki komin á mál enn. Men eg havi fult álit á, at vinnan fer at koma hartil, at hon kann endurnýggja seg uttan stuðul, sigur Jørgen Niclasen.

Hann vísti á, at føroyska fiskivinnan fær meira burturúr nú, hóast allur almennur stuðul er tikin av. Einasta ískoytið, sum landskassin letur til fiskivinnuna, er minstalønin til manningarnar, men her er bert talan um stívliga 20 milliónir krónur.

– Minstalønin skal eisini í framtíðini verða ein trygd í vinnuni, men tess betri og effektivari fiskivinnan gerst, tess meira fáa fiskimenn og arbeiðsfólk burtur úr, og so minkar ella dettur minstalønin burtur. Men skipanin skal verða har sum ein trygd í framtíðini eisini, sigur Jørgen Niclasen.

– Tað verður upp til tey, sum eiga skipini og virkini at tryggja, at tað ikki verða ávís øki, sum verða serliga rakt av samanleggingum í størri eindir, sigur Jørgen Niclasen.
Mynd: Jóannes Poulsen

Ongin avgerð um ˙tbygging Ì Havn

ñ Landsst˝rið fer n˙ at viðgerða, um tað skal geva TÛrshavnar Kommunu stuðul til at byggja havnarlagið ˙t.

SAMFERÐSLA
Áki Bertholdsen

Næstan allur inn- og útflutningur í Føroyum gongur um havnina og tað setir stór krøv til útbygging. men enn er óvist um landskassin vil betala ein part

Landsstýrið fer nú at taka støðu til, antin Tórshavnar Kommuna skal fáa stuðul til at byggja havnarlagið út fyri.

Nú bæði nýggj Norrøna og nýggja suðuroyarferjan kemur, verður neyðugt at byggja samferðsluhavnina á Bursatanga út fyri yvir 60 milliónir.

Skal havnin bara byggjast út til nýggja suður-oyarskipið, fer tað at kosta góðar 30 milliónir.

Tórshavnar Býráð heldur ikki, at tað skal betala hesar útbyggingarnar einsamøll. Harafturat heldur hon, at tann parturin, sum kommunan skal betala, ikki skal takast av útbyggingarkvotuni hjá kommununi upp á 70 milliónir.

Tórshavnar Býráð vísir á, at á Tvøroyri ætlar Landsstýrið at byggja nýggja samferðsluhavn til nýggju suðuroyarferjuna og tað heldur Býráðið eisini, at landið skal gera í Havn. Harafturat eru útbyggingarnar til Norrønu fyri alt landið og tí heldur Býráðið ikki, at tað er rímiligt, at tað verður tikið av útbyggingarkvotuni.

Til viðgerðar

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur, at málið er nú til viðgerðar. Hann hevur sent málið til Landsverkfrøðingin, sum nú skal gera eina meting.

Fyrrenn hon er komin, vil Bjarni Djurholm onki siga.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur heldur onki greitt svar nú.

Hann vísir tó á, at hann er settur at arbeiða fyri føroyska búskapinum sum heild og tað ætlar hann sær at gera.

Hann vísir eisini á, at vit skulu vera serliga varin við at byggja út í høvuðsstaðnum, tí her er búskapurin heitast frammanundan.

Hinvegin vísir hann á, at so gott sum allir inn- og útflutningur í Føroyum gongur um Havnina og tað setir sera stór krøv til útbyggingar.

Sk·la og RunavÌk eru n˙ til reiðar at leggja saman

M·nakv¯ldið vÛrðu seinastu forðingarnar beindar av vegnum og n˙ skulu borgararnir spyrjast til r·ðs

KOMMUNU-SAMANLEGGING
Áki Bertholdsen

Mánakvøldið gav Bygdaráðið á Skála grønt ljós fyri at arbeiða víðari við ætlanunum at leggja Skála- og Runavíkar kommunu saman. Gongst sum ætlað, verða kommunurnar samanlagdar 1. januar 2005.Tá verður tað mesta av Føroya longsta fjørði í somu kommunu

Tað er nú greitt, at tað verður arbeitt víðari við ætlanini at leggja Runavíkar- og Skála kommunu saman.

Tað gjørdust greitt eftir bygdaráðsfundir á Skála fríggjakvøldið og mánakvøldið.

Bygdaráðið á Skála hevur annars verið eitt sindur ivingarsamt um samanlegging.

– Hetta er ein stór avgerð at taka. Skulu vit leggja saman við Runavík, verður tað talan um, at ein lítil kommuna skal leggja saman við eini stórari kommunu. Og spurningurin, vit hava sett okkum, er, hvussu vit koma at síggjast aftur í tí stóru heildini, ella um vit fara at hvørva, sigur Kári Johannesen, borgarstjóri á Skála.

Men hann sigur, at eftir fundirnar fríggjakvøldið og mánakvøldið, er bygdaráðið komið til tað niðurstøðu, at tað er rættast at arbeiða víðari við samanleggingini.

Sostatt verður borgarafundur á Skála 1. oktober um samanlegging við Runavík og umleið 8. oktober verður fólkaatkvøða.

Dagurin fyri fólkaatkvøðuna er ikki heilt greiður enn, men tað verður umleið 8. oktober.

Nøkunlunda samstundis verða eisini borgarafundir og fólkaatkvøða í Runavík. Ætlanin er, at bygdirnar báðar skulu verða ein kommuna frá 1. januar 2005 at rokna, tvs. eftir kommunuvalið í 2004.

Fyrimunur

Kári Johannesen sigur, at hann væntar, at ein samanlegging verður ein fyrimunur fyri Skála.

– Vit hava útbyggingar, sum vit ætla okkum í holt við og tað vera vit betri før fyri, um vit eru í einari stórari kommunu. Vit vera eisini betri før fyri at bjóða okkum fram úteftir, um vit eru í eini

Hann vísir eisini á, at tá ið kommunurnar eru samanlagdar, ráða tær yvir at kalla øllum Skálafjørðinum og tað gevur teimum heilt aðrar møguleikar at leggja virksemi og útbyggingar til rættis, so at tað tænir øllum økinum og sostatt eisini Skála bygd.

Tað er eitt nú onki at ivast í, at vit vera betri før fyri at bjóða okkum fram til ymisk endamál, um vit eru í eini stórari eind, heldur enn í tveimum minni eindum.